## Tøk grundøki við Gøtugjógv

**Gøta:** Áhugin fyri at búseta seg í Gøtu er alsamt vaksandi, og kommunan arbeiðir støðugt við at nøkta tørvin.

Í Syðrugøtu bleiv ein útstykking á 13 stykki gjørd í fjør, og í Norðragøtu verða umleið 15 stykki útlutað í næstum.

Við Gøtugjógv eru fýra stykki tøk í nýggjastu útstykkingini.

Í løtuni arbeiðir kommunan við framtíðar útstykkingum og bústaðarmøguleikum í Gøtu kommunu, og ætlar seinni í ár at seta út í kortið hesum viðvíkjandi.

**sb.**



*Áhugin fyri at byggja í Gøtu er vaksandi*

## Nýggj bussleið á Skálafjørðinum

**Strendur:** Fyri at betra um ferðamøguleikarnar hjá borgarum í Sjóvar kommunu, hevur kommunan nú gjørt avtalu við Runavíkar kommunu og Strandfaraskip Landsins um Skálaleiðina, sum 1. apríl 2005 byrjaði at koyra millum Selatrað og Toftir.

Fyri at koyra við avsláttri við Skálaleiðini krevst eitt borgarakort, sum strandingar kunnu fáa við at venda sær til kommunuskrivstovuna á.

Borgarar í Sjóvar kommunu rinda hálvan ferðaseðlaprís við at vísa bussføraranum borgarakortið, skrivar heimasíðan hjá Sjóvar kommunu.

**sb.**

## Stuðul fæst úr grunni

**Havn:** Nú er aftur møguleiki at søkja um stuðul úr grunninum Nuuk-Reykjavík-Tórshavn.

Býarstýrini í teimum trimum høvuðsstaðunum seta hvørt ár pening í grunnin, sum hevur til endamál at veita fíggjarligan stuðul til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Borgarar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, kunnu tí nú senda Tórshavnar kommunu umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað.

**sb.**

## Fýra forkunnug frímerki

**Postverkið:** Í gjár gav Postverkið út tveu nýggj frímerki. Virðini á teimum eru 5,50 á tveimum frímerkjum við haruni sum myndevni, og ávikavist 7,50 og 10 kr. fyri hini bæði, har myndevnini eru við føroyskum mati.

Tað er listamaðurin Edward Fuglø, sum hevur teknað báðar myndirnar.

Sagt verður, at tey, sum út frá myndunum fáa áhuga í at finna fram til føroyskar matuppskriftir, kunnu fara inn á heimasíðuna hjá Frímerkjadeildini. Á www.stamps.fo ber nevniliga til at leita fram uppskriftir úr bókunum "Matur og Matgerð" og úr "Góðaráð".

**sb.**

# Ljósmóður yvirtekur leiðsluna á føðideildini

**– Ein ljósmóður er settur sum leiðari á føðideildini á Landssjúkrahúsinum, men tað vilja sjúkrarøktarfrøðingarnir undir ongum umstøðum góðtaka**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Stríðið um føðideildina á Landssjúkrahúsinum hevur nú tikið eina nýggja vend.

Men tað merkir ikki, at tað er av.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava alla tíðina gjørt greitt, at teir góðtaka undir ongum umstøðum, at tað fakøkið, sum eitur sjúkrarøkt, verður tikið frá sjúkrarøktarfrøðingunum og lagt undir ljósmøðurnar.

Men síðani er eisini tað hent, at sjúkrarøktarfrøðingurin, sum var leiðari á føðideildini, er sett frá og ístaðin er ein ljósmóður sett sum leiðari.

Men beint undir leiðaranum eru so tveir millumleiðarir settir á jøvnum føti, ein ljósmóður og sjúkrarøktarfrøðingurin, sum áður var leiðari.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum sigur, at hetta er ein fyribils loysn, tí áðrenn eitt ár er farið, skal lýsast eftir nýggjari leiðslu.

Men tað er greitt, at ovasti leiðarin fyri føðideildina skal verða antin ljósmóður, sjúkrarøktarfrøðingur, ella hava bæi prógvini.

– Men tað, sum nú er sett í verk, góðtaka vit undir ongum umstøðum. Vit góðtaka undir ongum umstøðum, at ein ljósmóður skal hava leiðsluna á eini deild, har eisini sjúk børn og sjúkar barnakonur liggja, sigur Jana H.Dalsgaard, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

– Harumframt eru tvær ljósmøður nú í leiðsluni á føðideildini og sostatt er røktarfakligi leiðarin altíð í minniluta.

– Hon sigur, at hetta er nakað, sum sjúkrarøktarfrøðingarnir taka í størsta álvara og felagið fer tí at viðgera støðuna teir næstu dagarnar.

### Gera sítt ítarsta

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrahúsinum sigur, at tey fara at gera sítt ítarsta fyri at fáa føðideildina at virka væl.

Verður føðideildin umskipa, verður hon meiri umfatandi enn hon var, tí nú kemur ljósmóður deildin uppí.

Í tí sambandi eru nakrar treytir settar fyri leiðsluna.

– Vit hava sett ein leiðara, sum vit halda er best førur fyri at bera umskipingarnar á deildini ígjøgnum

Og tað hevur onki við tað at gera, at ljósmøðurnar hava gjørt greitt, at tær kunnu ikki arbeiða á føðideildini undir einum leiðara sum er sjúkrarøktarfrøðingur.

Deildarleiðarin er undir kirurgisku depilsleiðsluni og hevur yvirskipaðu rakstrarligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu leiðsluna av føðideildini og ljósmøðraskipanini. Vit meta, at tað hevur týdning at hava ein leiðara, sum hevur eina fakliga vitan, sum rakar breiddina í virkseminum og tað haldi eg kemur ljósmøðrunum til fyrimunar.

Men tað er ikki einasta treyt, tí vit vilja eisini hava ein leiðari við røttu persónligu eginleikunum, sigur Poul Geert Hansen.

# Ongin semja í eygsjón stríðnum um føðideildina

**– Í gjár tók stríðið um føðideildina eina vend, sum ikki bøtir um útlitini fyri eini semju**

UMLEGGINGAR Á FØÐIDEILDINI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein fundur sum skuldi vera í gjár um føðideildina varð avlýstur, tí ósemja tók seg upp um, hvør skuldi sleppa við á fund*

– Enn eru ongi útlit fyri eini semju á stríðnum um føðideildina á Landssjúkrahúsinum.

Tað er greitt, nú vikuskiftið er farið afturum.

Men tað merkir ikki, at málið er endað, tí sjúkrarøktarfrøðingarnir vilja framvegis ikki góðtaka ætlaðu umlegginginar á føðideldini

Og tær gera púra greitt, at tær hava als ikki slept málinum.

Fríggjadagin hevði nevndin í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fund um støðuna á føðideildini og í gjár var aftur fundur.

Men seinni í vikuni hevur felagið kallað allar limirnar á limafund at viðgera støðuna á føðideildini á Landssjúkrahúsinum.

### Bøtir ikki um útlitini

Men um vikuskiftið tók málið eina vend, sum í hvussu so er ikki gera útlitini fyri semju frægari.

– Fríggjadagin hevði leiðslan á Landssjúkrahúsinum játtað at koma á fund við nevndina í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar um støðunaá føðideildini, sigur Jana H. Dalsgaard, forkvinna í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Fundurin skuldi vera í gjáramorgunin.

Men hesin fundurin varð avlýstur, tí ósemja tók seg upp um, hvør skuldi sleppa við á fundin.

– Stutt áðrenn fundurin skuldi vera í gjáramorgunin boðaði leiðslan á Landssjúkrahúsinum frá, at hon vildi hava depilsleiðsluna, sum føðideildin hoyrir undir, við á fund. Treytin var, at kundi depilsleiðslan ikkki koma við á fundin, kom ovasta leiðslan á Landssjúkrahúsinum heldur ikki, vóru boðini frá sjúkrahússtjóranum.

Í depilsleiðsluni er Jóan Petur Davidsen leiðandi yvirlækni.

– Vit hava biðið um fund við ovastu leiðsluna fyri Landssjúkrahúsið, sum eru tey trý Poul Geert Hansen, stjóri fyri Landssjúkrahúsið, Marin Vang, røktarfakligur stjóri og Tummas í Garði, læknastjóri. Vit hava ikki biðið um fund við leiðandi yvirlæknan á føðideildini.

– Hetta var játtað okkum og tað halda vit okkum til, tí hetta er ovasta leiðslan á Landssjúkrahúsinum. Vit meta ikki, at vit hava nakað at tosað við leiðandi yvirlæknan føðideildini um, sigur Jana H. Dalsgaard.

Hon er sera misnøgd við framferðina hjá leiðsluni á Landssjúkrahúsinum.

– Men hetta fær okkum at ivast, hvør tað er, sum hevur veruligu leiðsluna á Landsjúkrahúsinum- um tað er tann formliga leiðslan, ella um tað í veruleikanum er leiðandi yvirlæknin, leggur hon afturat.

### Ikki hent fyrr

Poul Geert Hansen, stjóri á Landssjúkrasúsinum, sigur at tað er ikki sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum definera leiðsluna á Landssjúkrahúsinum.

– Tað hevur stóran týdning at tað er landssjúkrahúsið sjálvt, sum definerar leiðsluna.

Hann heldur, at tað er undarligt, at sjúkrarøktarfrøðingarnir nokta Landssjúkrahúsinum at hava leiðslufólk við á fundin.

– Tað havi eg ongantíð verið úti fyri fyrr, sigur hann.

Hann sigur, at í hesum føri umfatar leiðsluhugtakið bæði leiðsluna fyri landsjúkrahúsið og depilsleiðsluna.

– Tað er heilt avgjørt rímiligt, at depilsleiðslan er við og fær at vita beinleiðis, hvat fundurin er um, heldur enn at vit skulu endurgeva tað fyri teimum aftaná, sigur Poul Geert Hansen.